UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 3-5
100 Tórshavn

Dagfesting: **10. desember 2019**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 19/00017-33**

Svar

upp á

fyrispurning frá Djóna Nolsøe Joensen, løgtingsmanni, nr. 28/2019 eftir Tingskipanini § 52a. Fyrispurningur um útbúgving í journalistikki, settur landsstýrismanninum í mentamálum, Jenisi av Rana (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Ætlar landsstýrismaðurin at seta á stovn útbúgving í journalistikki?
2. Um so er, nær ætlar landsstýrismaðurin at seta hesa á stovn?
3. Hvussu heldur landsstýrismaðurin, at ein slík útbúgving eigur at verða skipað?

Svar

Til 1: Sambært teimum ætlanunum, ið fyriliggja beint nú, bæði tá ið hugt verður í samgonguskjalið hjá sitandi samgongu, og tá ið hugt verður í tey ynski um raðfestingar, sum Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur fingið frá Fróðskaparsetrinum, so kann ikki sigast, at útbúgving í journalistikki er tað, sum liggur sitandi samgongu fremst í huga. Skal eg svara stutt og skjótt uppá fyrsta spurning, verður svarið: nei, landsstýrismaðurin ætlar ikki at seta á stovn útbúgving í journalistikki beint nú. Málið er at fáa slíka útbúgving í lag, tá ið allir partar eru til reiðar til tess.Við hesum haldi eg meg eisini hava svarað spurningi 2.

Til 2: Eg kann leggja aftrat svarinum til spurning 2, at skuldi tað hent, at Fróðskaparsetrið fer at raðfesta hesa útbúgving í næstum, fari eg sjálvandi at viðgera ynskið við vælvild. Eg veit væl, at arbeitt hevur verið við ætlanum av hesum slag fyrr, men sum eg skilji á lagnum, hava tær ikki borið á mál. Tað er hugsandi, at hetta hevði verið ein gagnlig útbúgving at sett á stovn, men hetta má koma inn í raðfestingina hjá Fróðskaparsetrinum, og tað hevði verið upplagt, at hugt aftur í tær fyrireikingar, ið áður eru gjørdar í hesum sambandi, og vita, um sumt av tí, ið fyrr er fest á blað, framvegis er áhugavert. Hetta má sjálvandi gerast, tá ið tíðin er búgvin, og Fróðskaparsetrið metir seg at vera til reiðar at fara undir hesa útbúgvingina, og tá ið vit sum játtandi myndugleiki eru sinnað at játta tað, sum skal til.

Til 3: Verður slík útbúgving skipað, haldi eg, at tað rætta er at lata Fróðskaparsetrið skipa fyri henni. Fróðskaparsetrið hevur fleiri aðrar útbúgvingar, sum ein journalistútbúgving kann njóta gott av, t.d. føroyskt mál og føroyska søgu. Tað hevur eisini verið nevnt, at útbúgving sum henda, kann

leggjast til Glasir. Hesum eri eg ikki samdur í, tí eg haldi, at Glasir skal fáa frið at finna sín egna leist.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður